# Tíðin er komin hjá føroyskum politikarum og føroyskum vinnulívi av álvara at umhugsa møguleikar og avleiðingar av einari oljuvinnu

– Aðalmálið má avgjørt vera, at møgulig virði ikki verða søplað burtur í stuttskygni og persónligum áhugamálum, men at hugsað verður um, hvat í longdini tænir samfelagi og fólki best, sigur Finnbogi Arge, løgtingsmaður, sum áhugaður fylgir seismikkkanningunum, Western- skipið Sea Star er farið undir á føroyska landgrunninum

PÓL Á KLETTI



Mynd: Diml/Jens Christian

**Seismikkskipið Sea Star á Havnini. Spennandi verður tá ið fyrstu úrslitini frá seismisku kanningunum vera tøk um eitt hálvt ár ella so. Vónandi fara fjølmiðlarnir, sum í dag at kalla bara hava negativ tíðindi at bera fólki um samfelagsstøðuna, tá inn í eina positiva ringrás**



Mynd: Diml/Thomas

**Finnbogi Arge, løgtingsmaður: – Tað er rætt, at føroyskir politikarar hava verið sera varnir í spurninginum um oljuvinnu. Men eg haldi ikki, at hetta er av vantandi áhuga. Heldur man orsøkin vera tann, at eingin hevur hug at leypa framav. Og órímiliga marknaðarkravið hjá bretum komplicerar støðuna og ger sítt til, at menn eru hóvligir**

Fólkaflyting, arbeiðsloysi, tvingsilssølur, tómir fiskigrunnar, lágir fiskaprísir, politiskt máttloysi, óskil í umsitingini – hetta eru tey tíðindi, sum føroyingar dagliga verða fóðraðir við. Vit eru so von við negativ tíðindi, at Dagur og Vika er ikki áhugaverd longur um ikki eitthvørt skakandi er at hoyra.

*»Vit duga so ótrúliga væl at finnast at. Í práti manna millum, í lesarabrøvum, á pallborðsfundum, í táttum, í fríggjadagsviðmerkingum. Speirekandi, spottandi, gerandi alt til láturs. Vit vita sjálvi, hvat er hent okkum? Er tíðin ikki skjótt komin at lekja og byggja upp? Er bøtandi hond ikki betri enn spillandi tunga?«*

Soleiðis skrivaði Sandoyar prestur, Jákup Reinert Hansen, í eini positivari oddagrein í Kristiligum Ungmannablaði herfyri.

Er eingin glotti, er einki positivt at røða um?

– Jú, vit eiga at fegnast um eina stórhending, sum er farin fram mitt í øllum ruðuleikanum. Tað var tá tann borgarliga danska stjórnin – hóast mótstøðu frá donsku sosialdemokratunum – handaði okkum rættin til ráevnini í undirgrundini, sigur Finnbogi Arge, løgtingsmaður, sum Dimmalætting nú ein dagin hitti á máli og spurdi um ljósglottar fyri framman og líkindi hjá føroyska samfelagnum at fóta sær aftur búskaparliga.

Hann hevur valt at taka fram spurningin um møguleikarnar um framtíðar oljuvinnu í Føroyum nú Western Geophysical Corporation hevur sent skip sítt Sea Star higar at gera seismiskar kanningar á landgrunni okkara. Ein eigur at seta vónir til hesar kanningar.

## Loysingarflokkarnir avreitt undirgrundina

Í mong ár brúktu loysingarflokkarnir spurningin um undirgrundina sum prógv fyri donskum imperialistiskum áhugamálum í Føroyum.

– Nú danir hava víst okkum nakað annað, siga loysingarflokkarnir, at hetta gera teir bara fyri at sleppa undan at geva ES ávirkan á møguliga olju í føroysku undirgrundini. Tjóðskaparliga hugflognum darvar einki, tá illgitast skal um donsk motiv í hesum sambandi, sigur Finnbogi Arge.

Í fíggjaravtaluni millum landsstýrið og donsku ríkisstjórnina frá 12. oktober 1993 stendur hetta um undirgrundarspurningin:

*Ifølge punkt 6 i **Aftale mellem regeringen og Færøernes landsstyre om råstoffer i undergrunden af 22. december 1992** vil eventuelle indtægter fra fremtidig råstofvinding udløse forhandlinger om nedsættelse af statens tilskud til Færøerne. Det er derudover regeringens hensigt, at en del af disse indtægter skal medgå til at nedbringe eventuel udestående restgæld på statslån, som er bevilget landsstyret i forbindelse med genopretning af de færøske bankers og landskassens økonomi.*

*I aftalen af 22. december 1992 tilkendegiver landsstyret at være indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser, forudsat konkurrencedygtighed at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvikling. Landsstyret og regeringen vil snarest i fællesskab overveje udmøntningen heraf.*

Tað, sum er hent, er í stuttum, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hava bundið føroyingar til at brúka møguligar oljuinntøkur at rinda aftur skuld til danir umframt at lata danir luttaka í oljuvinnuni. Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum avloystu Fólkaflokkin í samgongu við Javnaðarflokkin, hava í avtaluni 12. oktober 1993 staðfest og váttað upprunaavtaluna.

– Vit kunnu ímynda okkum, hvussu stórur ágangurin hevði verið ímóti Sambandsflokkinum, um hann hevði átt lut í hesum avtalum. So høvdu loysingarflokkarnir fingið eitt nýtt *1906-* ella *1948-syndrom,* sum vit høvdu hoyrt endurtikið umaftur og umaftur í áravís, ja, kanska øldir, sigur Finnbogi Arge.

Hann sigur, at støðan í dag er tann, at teir flokkarnir, sum vilja loysa frá Danmark, í roynd hava **bundið** føroyingar í undirgrundarmálinum, og at tað tessvegna verður eitt tak hjá Sambandsflokkinum í einum komandi landsstýri at fáa skil á hallinum á fíggjarlógini og búskapinum annars so at fleiri virði ikki gleppa av honum.




**Mest sannlíkt er, at møguligar oljukeldur eru tætt við miðlinjuna. Men teir serkønu vísa eisini stóran áhuga fyri Sandoyarbankanum og øðrum leiðum**

## Politikarar vilja ikki leypa framav

Enn vita vit ikki um ríkidømi finst í undirgrundini, men okkurt bendir so á, at møguleikin er til staðar. Drúgva og góða frágreiðingin hjá oljuráðlegginarnevndini hevur hesa stuttu niðurstøðu:

*Við støði í tí lítla, vit hava at byggja á, ber til at halda, at líkindi kunnu vera til, at olja og gass kunnu vera víða hvar á Føroya leiðini.*

Og Føroya leiðin er ikki nøkur hissini leið. Innbjóðingin til oljufeløgini fevnir um eitt øki uppá 190.000 ferkilometrar av okkara landgrunni innan fyri 200 fjórðingar.

Beint sunnan fyri miðlinjuna millum Føroyar og Hetland eru funnar nýggjar oljukeldur, sum í dagsins prísum hava eitt virði uppá 500 mia. kr.

Hósdagin í farnu viku vísti Dimmalætting á, at vanliga fatanin millum føroyingar er, at oljuvinna verður eingin í bræði. Sagt var, at oljuvinnan stendur aftarlaga í huganum hjá politikarum og teimum valevnum, sum hava bjóðað seg fram til hetta løgtingsvalið. Verður hon nevnd, er tað einans í onkrum eykasetningi.

Í blaðnum nevndu vit eisini, at møguleiki er fyri, at royndarboringar eftir olju longu kunnu byrja um tvey ár.

– Tað er rætt, at føroyskir politikarar hava verið sera varnir í spurninginum um oljuvinnu. Men eg haldi ikki, at hetta er av vantandi áhuga. Heldur man orsøkin vera tann, at eingin hevur hug at leypa framav. Og órímiliga marknaðarkravið hjá bretum komplicerar støðuna og ger sítt til, at menn eru hóvligir, sigur Finnbogi Arge.

## Áttu at brúkt sama politiska framferðarhátt sum bretar

Men Finnbogi Arge ger tó vart vit, at hetta kanska er eitt mistak. Tí meðan føroyingar liggja í andaleypi orsakað av respekt fyri samráðingunum, gera bretar ovurstórar fløgur beint sunnan fyri markið.

Bretar styrkja á henda hátt um grundarlagið fyri teirra (órímiliga) kravi. Soleiðis vóna teir at kunna prógva, at teir hava átt ein søguligan og virknan leiklut á økinum.

Endamál teirra er sjálvandi at hava eitt betri grundstøði enn vit, tá ið marknaðartrætan loksins endar hjá dómstólinum í Haag.

– Tí kunnu vit av røttum spyrja, um vit ikki missa meira fyri minni við at drála ov leingi. Vit áttu at brúkt sama politiska framferðarhátt sum bretar, sigur Finnbogi Arge.

## Tíðin komin

Mest sannlíkt er, at møguligar oljukeldur eru tætt við miðlinjuna. Men teir serkønu vísa eisini stóran áhuga fyri Sandoyarbankanum og øðrum leiðum.

Spennandi verður tá ið fyrstu úrslitini frá seismisku kanningunum vera um eitt hálvt ár ella so. Vónandi fara fjølmiðlarnir, sum í dag at kalla bara hava negativ tíðindi at bera fólki um samfelagsstøðuna, tá inn í eina positiva ringrás.

– Positiv úrslit ella ikki – tíðin er undir øllum umstøðum komin hagar til, at føroyskir politikarar og føroyskt vinnulív av álvara fara at umhugsa møguleikar og avleiðingar av einari oljuvinnu, sigur Finnbogi Arge.

Hann sigur, at aðalmálið avgjørt má vera, at møgulig virði ikki verða søplað burtur í stuttskygni og persónligum áhugamálum, men at hugsað verður um, hvat í longdini tænir samfelagi og fólki best.



**Føroyingar gera eitt mistak at vera alt ov hóvligir og aka á knøunum fyri bretum. Tí meðan føroyingar liggja í andaleypi orsakað av respekt fyri samráðingunum, gera bretar ovurstórar fløgur beint sunnan fyri markið. Bretar styrkja á henda hátt um grundarlagið fyri teirra (órímiliga) kravi. Soleiðis vóna teir at kunna prógva, at teir hava átt ein søguligan og virknan leiklut á økinum. Endamál teirra er sjálvandi at hava eitt betri grundstøði enn vit, tá ið marknaðartrætan loksins endar hjá dómstólinum í Haag**



**Í 1981 varð farið undir royndarboringar í Lopra.**